# du ikki um tindin

enna ljósið. Støðan sum minniluti í lítlu brøðrasamkomuni
rið fleiri við politiska myndugleikan, sum sambært teimum
ðla leiðandi persónum í okkara samfelagi



## Pál Weihe

**Treiski yvirlæknin og granskarin hevur í mong ár markerað seg sum ein av fremstu føroysku granskarunum. Kyksilvurkanningar hansara hava eisini gjørt hann kendan uttanfyri landoddarnar, og hann er javnan í fjølmiðlunum orsakað av sínum áhaldandi granskingararbeiði seinastu 20 árini. Hann var læknastjóri á Landssjúkrahúsinum í 11 ár, m.a. í turbulentu kreppuárunum fyrst í nítiárunum, og hann hevur umframt hetta verið virkin í ymsum nevndarsessum, sum hava havt tilknýti til heilsu og vælferð.**

um eitt leiðandi starv, og upprunaliga eri eg á ongan hátt ambitiøsur. Eg var vanligur verkfrøðingur á SEV, tá eg ein seinnapart í 1982 varð róptur inn á stýrisfund og fekk fyrispurning, um eg vildi taka við sum fyribils stjóri á SEV, tí verandi stjóri var vorðin sjúkur. Eg fekk bert 15 minuttir at umhugsa støðuna, eg segði ja, tí hesin møguleikin kom ikki aftur. Hetta hevur síðani myndað mína lívsleið. Eg var heilt einfalt tikin av fótum, tí eg helt meg ikki hava eginleikar at standa við róðrið.

So upprunaliga var tað mest sannlíkt, at eg skuldi gerast ein vanliga anonymur starvsmaður, og eg hugsaði als ikki um nakran stjórasess. Men eins og Pál sigur, eru føroysku tindarnir lítlir samanborið við útheimin, og Føroyar kunnu tí gerast lítlar fyri persónar við veruligum ambitiónum.

### Illoyalir politikarar

*Hvussu er lívið sum SEV-stjóri, læknastjóri og sum almennur persónur í Føroyum?*

**Pál:** Sum heild hevur lívið í mínum yrki verið gott. Eg havi hitt góðvilja frá føroyska fólkinum, og eg havi havt nógvar møguleikar.

**Klæmint:** Eg havi fingið eitt rásarúm, sum hevur gjørt tað gjørligt at arbeiða og koma til úrslit, og eg havi notið frælsið at royna nýggjar leiðir.

*Skapa føroysku myndugleikarnir so nóg stórt rásarúm og nóg góðar umstøður til tey, sum taka tungu tøkini og standa við stóru ábyrgdini í okkara samfelagi?*

**Pál:** Nei, tað gera teir ikki, og hóast eg hyggjandi afturá sum heild eri glaður, havi eg eisini fingið eyga á eitt óheppið fyribrigdi, almennu Føroyar hava. Talan er um ein ávísan illoyalitet frá politiska myndugleikanum mótvegis sínum leiðarum. Eg upplivdi hetta sjálvur, tá politikararnir í kreppuárunum fyrst í nítiárunum heittu á okkum um at umsita eina stórliga skerda játtan. Vit játtaðu og fóru so í holt við truplu, neyðugu og keðiligu uppgávuna. Men tá vit so høvdu gjørt okkara arbeiði so væl, vit kundu, vórðu vit kritiseraðir sundur og saman, eisini av politikarum. Tað tykist, sum at politikararnir høvdu gloymt, at vit gjørdu tað keðiliga arbeiðið fyri teir. Eg stóð spyrjandi og upplivdi tá, at almennu Føroyar ikki vóru loyalar móti okkum, sum høvdu roynt at nútímansgera sjúkrahúsverkið hóast stórliga skerdar játtanir.

**Klæmint:** Í kreppuárunum var hetta eitt sera sjónligt rák, har einstaklingar í leiðandi sessum ferð eftir ferð vórðu gjørdir til "skurkar" av politiska myndugleikanum. Fólk vórðu av almennu Føroyum sett við róðrið, og tá tey royndu at loysa sínar uppgávur, vendu politikararnir kanónirnar móti teimum. Avleiðingin av hesum ráki var, at kapasitetar við førleika hildu seg aftur, og soleiðis motiverar tú ongan at taka tungu og neyðugu tøkini. Vit hava í dag enn eitt dømi, har leiðslan í Fiskavirking fær av at vita eftir skrædlið í Suðuroy, og atfinningarnar frá politikarum eru undir alt lágmark.

*Hevur tú eisini upplivað hetta Klæmint?*

**Klæmint:** Sum stjóri í SEV havi eg verið í fleiri orrustum við politiska myndugleikan, men eg hevði tann fyrimun, at mítt egna politiska bakland á fyritøkuni var allan vegin intakt og bakkaði upp. Vit stóðu saman, tá ágangurin var harðast frá politiskari síðu, og vit náddu settum málum. Men eg kann ímynda mær truplu støðuna hjá teimum leiðarum, sum umframt ágang frá myndugleikunum heldur ikki hava síni egnu at styðja seg til, sum eg hevði.

Men skulu okkara "valdsharrar" so ikki viðgerast kritiskt og gera roknskap fyri sín framferðarhátt?

**Pál:** Sjálvandi skulu teir tað, og eg tosi als ikki um at økja komfortin hjá teimum á ovastu rók. Okkara leiðarar skulu sjálvsagt viðgerast kritiskt, men teir hava krav uppá eina sømiliga viðgerð, og tá politikararnir seta persónar at loysa ávísar uppgávur, skulu teir eisini stuðla hesum fólkum, tá tey fara í holt við at loysa uppgávurnar. Í staðin síggja vit, at persónar við ábyrgd støðugt verða andaðir í nakkan og gjørdir til syndabukkar. Ivi verður sáddur um teirra førleika. Um politiska baklandið er illoyalt, gerast okkara leiðarar hálvir, opportunistiskir og afturhaldandi í staðin fyri optimalir.

Eg sigi ikki, at ein og hvør ódugnaligur almennur stjóri skal sleppa at sita trygt í sínum sessi, men at politiski myndugleikin skal læra seg at stuðla alement líka til teir siga stop, eins og nevndir í partafeløgum gera við sínar stjórar.

### Friður

*Um tit hyggja afturá, høvdu tit við øllum hesum í huga ynskt tykkum eina meira friðarliga og anonyma lívsleið?*

**Pál:** Hóast truplar uppgávur havi eg, sum eg segði í áðni, sum heild verið glaður og takksamur fyri tað, eg havi fingið loyvi til og upplivað, og eg havi eisini hitt stóra samfelagsliga vælvild. Hugsi her serliga um øll tey foreldur og børn, sum hava luttikið í mínum kanningum gjøgnum árini, og sum gera tað enn. Partar av mínum arbeiðsuppgávum hava verið í almennum ljósi, t.d. spurningar um fólkaheilsu. Tað er ein partur av arbeiðinum, og skuldi eg valt umaftur, hevði eg fari somu leið.

**Klæmint:** Eg eri glaður fyri, at eg segði ja til stjórasessin í SEV, og tað hevur verið mennandi og ein spennandi framíhjárættur. Men tað hevði verið naivt at hildið, at ein ikki fór at uppliva mótgongd, og mótgongdina havi eg so eisini tikið við. Onkuntíð hevur tað verið strævið, tá fjølmiðlarnir eru farnir eftir manninum í staðin fyri bóltinum, tá fokus er flutt frá málið til persón, og tá viðgerðin er vorðin ósømilig. Eftir hesi mongu ár á ovastu rók kundi eg tó ynskt mær minni alment ljós og meiri frið kring meg sjálvan.

### Fakta um Pál

Føddur í 1949
Studentsprógv í 1969
Læknaprógv í 1977
Granskari síðan 1985
Yvirlækni síðan 1988
Læknastjóri frá 1989-2000
Granskingarlektari í umhvørvislæknafrøði síðan 1995
Núverandi nevndarsessir: Formaður í Listafelag Føroya, nevndarlimur í Forskningsenheden for Maritim Medicin á Syddansk Universitet, nevndarlimur í Center for Arktisk Miljømedicin á Århus Universitet.